# Almanna- og Heilsumálastýrið

## Stjóri á Almannastovuni

**Starvið sum stjóri fyri Almannastovuna verður við hesum lýst leyst til setan 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu.**

**Ábyrgdarøki:**

- Fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina eftir øllum lógum og fyriskipanum á Almannastovuni, sum umfatar pensjóns, dagpenga, forsorgar, barnaforsorgar og barnapeningaøkið umframt HTM, innan teir fíggjarkarmar, sum hvørt ár verða samtyktir í ársins fíggjarlóg.
- Viðvirka til at Almannastovan er í støðugari menning og skipa arbeiðið soleiðis at Almannastovan støðugt tillagar seg tørvinum hjá brúkaranum og broytingunum í treytunum hjá Almannastovuni.
- Viðvirka til at tryggja eitt alsamt betri samskifti við allar stovnar innan Almanna- og heilsuøki og harvið viðvirka til at menna eitt tvørfakligt samstarv.

**Førleikakrøv:**

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.
- Leiðsluevnir og royndir.
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Evni til at eggja og menna leiðarar og starvsfólk.
- Góð samstarvsevni.

Kunnleiki til Almannaverkið er ein fyrimunur, men ongin treyt.

**Um starvið:**
Tað, sum bjóðað verður, er eitt sjálvstøðugt starv, har tann, sum settur verður, sjálvur saman við starvsfólkunum myndar Almannastovuna.
Tær bygnaðarbroytingar sum eru farnar fram innan almanna- og heilsuøki hava eisini havt ávirkan á Almannastovuna, og skal tí framvegis væntast ein ávís tillagingartíð.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins. Lønt í 37. lønarflokki.
Starvið er skipað undir Almanna- og heilsumálastýrinum, við tilvísing til aðalstjóran.

Viðmerkjast skal at setanin umfatar alt Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí.

**Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Høgna Joensen, aðalstjóra, ella Aibritt á Plógv, deildarstjóra tlf. 30 40 50.**

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 15. juni 2000 kl. 14.00

# Varafyristøðufólk

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum Á Mýrini 4 og 6 í Hoyvík, er eitt tænastumannastarv sum varafyristøðufólk leyst at søkja til setan 1. august 2000. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Mýran 4 og 6 eru heim hjá 10 menningartarnaðum fólkum, sum krevja hjálp og vegleiðing í tí dagliga.

Uppgávan hjá varafyristøðufólkinum er at stuðla fyristøðufólkinum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka hansara uppgávur, tá hesin ikki er til staðar. Væntað verður av varafyristøðufólkinum, at tað hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiðið í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt. Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Esbern Fuglø á tlf. 31 14 78 ella 31 99 58.
Umsóknarfreistin er 15. juni 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Sambýlini Á Mýrini 4 og 6**
**Á Mýrini 6 · FO-188 Hoyvík**

# Sjónleikur

Kvøldskúlin og Sjónleikarafelagið skipa fyri fjølbroyttum sjónleikaraskeiði í skúlanum við Biritu Mohr sum leiðara.

Skrá:
1. Drama og sjónleikur
2. Venjing av røddum
3. Leikstjórn

Byrjað verður fríggjakvøldið 19. mai kl. 19.

Tilmelding og nærri kunning á tlf. 445115

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**Tlf. 444087**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 2.0 Diesel 4 hurðar
**Árg.:** 11.05.1998
**Km:** 96.800

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú. Hann kann síggjast á verkstaðnum hjá Reyni Service, Vegurin Langi, Hoyvík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Att.: John Ellefsen

Tlf. 34 56 00 - lokal 726
Fartelefon nr. 28 85 92
fax nr. 34 56 07
at hitta millum kl. $13^{00}$–$15^{00}$

# P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ RASMUSSEN & WEIHE

## Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur

Fyri eitt byggifelag við heimstaði í Havn verður søkt eftir einum verkfrøðingi ella byggifrøðingi.

Tann, ið settur verður í starvið, skal arbeiða bæði á teknistovuni og úti á byggiplássum.

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við leiðsluna, men tú skalt eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt og, tá tað krevst, taka stig til at fremja tær neyðugu arbeiðsuppgávurnar.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. mai 2000 kl. 16. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen og Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Gladsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Kollafjarðar Havn

Í sambandi við sundalagsstevnuna, ið verður hildin í Kollafirði mánaðarskiftið juni/juli, verður gjørt vart við, at allir bátar, ið standa uppi á landi við bátahylin við Sjógv, skulu verða flotaðir ella fluttir burtur av økinum, og plássið skal vera ruddað innan hálvan juni.

Kollafjarðar Havn

# Íbúð søkist

frá ársskiftinum 2000/2001 til sjómann. Helst í Klaksvík ella Tórshavn.

**Tlf. 0045 28209570**



# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Deildarstjóri til vinnu- og miðnámsskúladeildina

*Starvið:*
Nú deildarstjóri okkara er farin úr starvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið er skipað við 3 deildum: Fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild og mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá vinnu- og miðnámsskúladeildini eru at:

- Fyrisita hægru umsitingina av vinnu- og miðnámsútbúgvingum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum

Deildarstjórin er leiðari á vinnu- og miðnámsskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

*Førleikakrøv:*
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava

- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

*Vit bjóða:*
Undirvísingar- og Mentamálastýrið mennist alsamt og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

*Setanar- og lønartreytir:*
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

*Umsókn*
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Undirvísingar- og Mentamálstýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. juni 2000. Starvið verður sett frá 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Undirvísingar- og mentamálastýrinum, á telefon 35 50 50.

*Undirvísingar- og mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Í **vinnu- og miðnámsskúladeildini** eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlarnir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og lærlingaútbúgvingar.*

# PF LEIF MOHR

## Køliseminar

**Pf. Leif Mohr og Carrier Køleteknik/Electrolux vilja við hesum bjóða øllum áhugaðum til køliseminar á Hotel Hafnia týsdagin 23. mai kl. 10.00.**

Electrolux IWO sum er vorðið ein partur av stóru amerikonsku fyritøkuni Carrier, er ein av størstu veitarunum í Danmark av køli- og frystianleggum til handlar, kioskir, bensinstøðir og onnur sølustøð.

Á hesum seminari, ið væntandi kemur at vara góðar 4 tímar, verður umfatandi produktskráin hjá Carrier Køleteknik gjøgnumgingin, og kunnað verður eisini um ta menning, ið er á marknaðinum í Danmark og Europa.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Pf. Leif Mohr á telefon 31 12 20, og tosa við Hjalmar, Leivur ella Eirik.



**Tilmelding á tel 31 12 20**
**Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin 19. mai 2000.**

p/f Leif Mohr Smyrilsvegur 2 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 31 12 20 Fax 31 48 62 e-mail: lm@leif-mohr.fo www.leif-mohr.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2664, **Sp/f Lido Seafood, 220 Skálavík.**

**Grannsko›ari:**
Farin frá sum grannsko›ari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannsko›ari: P/F Grannsko›arafelagi› Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 11. mai 2000

Kristin Balle

# Suðuroyarleiðin - Leið 7

Frá fyrst í komandi viku og til nærri verður lýst, siglir Claymore fyri Smyril.

Siglingartíð: 2 tímar 45 min.

| Tvøroyri Kl. | Dagur | Tórshavn Kl. | Dagur |
|---|---|---|---|
| 06:00 | 157 | 09:00 | 7 |
| 07:00 | 2346 | 10:30 | 12356 |
| | | 13:30 | 4 |
| 14:00 | 1235 | 19:00 | 1235 |
| 17:15 | 67 | 20:15 | 67 |
| 18:30 | 4 Farmatúrur | 22:00 | 4 |

Rutuupplýsingin, tlf. 34 30 30 - Fax 34 30 03
Heimasíða: www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

# ANJA ANDERSEN TIL FØROYA

formula.fo
www.formula.fo

Sosialurin - 311820